LØGTINGIÐ

Løgtingsgrannskoðararnir
c/o Landsgrannskoðanin
Postboks 2053
FO-165 Argir

Landsstýrismálanevndin

**13.03.2018**
**j. nr. 7.13-20180004² RS/ód**
(at tilskila í svari)

**Klaga til Landsstýrismálanevndina um handfaringina hjá Kristinu Háfoss, landsstýrismanni, av málinum um lønarútgjaldingar til limir í Føroya Pedagogfelag undir verkfalli**

Tann 7. mars 2018 hevur Landsstýrismálanevndin fingið áheitan frá Bill Justinussen, løgtingsmanni, um at taka hetta mál upp. Skrivið hjálagt.

Á fundi í Landsstýrismálanevndini tann 12. mars 2018 varð málið umrøtt, og vísandi til starvsskipan nevndarinnar § 5, stk. 1, nr. 6 varð gjørt av at senda spurningin til víðari viðgerð hjá løgtingsgrannskoðarunum um, hvørt ein útreiðsla er hildin, sum ikki lógarheimild er fyri. Heitt verður á løgtingsgrannskoðararnar um at kunna nevndina um sína niðurstøðu soleiðis, at Landsstýrismálanevndin eftirfylgjandi kann taka støðu til møguliga víðari kanning í málinum við atliti til aðrar spurningar.

Nevndarinnar vegna

Magnus Rasmussen
formaður